# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Tummas Ennistein:

## Ríkisgóðkendur grannskoðari



Tummas Ennistein (Brix), ættaður av Hvítanesi, Streymoy, búsitandi í Hvidovre, hevur 29. november 2006 staðið royndina sum ríkisgóðkendur grannskoðari.

Tummas hevur tey seinastu árini arbeitt hjá Deloitte í Keypmannahavn. Deloitta er ein av heimsins størstu ráð- og grannskoðarafyritøkum við 120.000 starvsfólkum – av teimum starvast 2.000 í Danmark.

Tummas bleiv útnevndur sum Manager hjá Deloitte á sumri 2005.

## Hans Holm 70 ár

Í dag, týsdagin 12. desember, verður Hans Holm í Havn 70 ár. Hans var í mong ár lærari á Læraraskúlanum.

Hans Holm er ættaður av Tvøroyri. Bæði foreldrini, Elsa fødd Øster og Jaspur Holm vóru ættað av Tvøroyri. Umframt Hans átti tey sonin Karsten, sum hevur búð niðri í mong ár. Hans, sum er uppvaksin á Sevmýri og seinni á Tippinum, tók preliminerprógv í 1952 á Tvøroyri, og í 1955 leyk hann nýmálsligt studentsprógv frá Rungsted Statsskole.

Síðani fór Hans undir lestur við lærda háskúlan í Keypmannahavn, har hann tók cand. mag. prógv í geografi og biologi í 1965. Áðrenn hann kom aftur til Føroya, leyk Hans pedagogikum á Vestre Borgendydskole í Keypmannahavn.

Hans var vikarur á Føroya Læraraskúla, Føroya Studentaskúla og Fróðskaparsetri Føroya, áðrenn hann 1. august 1966 varð settur í fast starv á Føroya Studentaskúla. Hans varðveitti sambandið við Læraraskúlan, har hann 1. august 1969 varð settur í fast starv. Hans fór úr starvinum á Læraraskúlanum í 2000. Síðani tá hevur hann okkurt skifti verið vikarur á Føroya Studentaskúla.

Hans er ógvuliga áhugaður í ítrótti, og serliga hondbóltin hevur hann nýtt nógva tíð og orku uppá. Hann spældi við TB, og í lestrarárunum í Keypmannahavn var Hans aktivur í ÍF Føroyar.



Tey fjøruti árini, síðani Hans flutti til Havnar, hevur hann verið ógvuliga stórur stuðul í hondbóltinum. Hans var formaður í Neistanum 1966-1976, og inntil nýliga hevur hann verið venjari. Hann hevur stuðlað og hjálpt til á so mangan hátt, eitt nú við at døma nógv í yngru og lægru deildunum.

Hans var stjórnarlimur í ÍSF í fleiri ár, og hann royndi seg eisini sum landsliðsvenjari.

Í 1978 gjørdist Hans formaður í hondbóltsdeildini hjá ÍSF, og í 1980 varð hann fyrsti formaður í kappingarnevndini hjá Hondbóltssambandinum. Hans røkti hesa kravmiklu uppgávuna inntil í 1999. Tey, sum hava innlit í hesi viðurskiftini, siga, at Hans í hesum sessinum uttan samsýning framdi framúr arbeiði og var lyklapersónurin, ið legði kappingarnar til rættis. Fyri sítt stóra ítróttarliga arbeiði fekk Hans í 1989 gullmerki frá ÍSF, og í 1999 fekk hann heiðurskross frá ÍSF fyri at hava verið venjari og kappingarstjóri í eitt mannaminni.

Hans Holm giftist 6. januar í 1962 við Sólrun fødd Mohr og ættað úr Havn. Børnini hjá teimum eru Leivur (1962), Ingigerð (1965) og Gisleyg (1968). Gisleyg býr í Keypmannahavn, og Leivur og Ingigerð búgva í Havn. Hans eigur fýra abbabørn.

Stóra fakliga vitanin og innlitið hjá Hansi er komið føroyingum til góða eitt nú á tann hátt, at hann í bløðunum og ikki minst í útvarpinum á sínum eyðkenda suðuroyarmáli hevur megnað á leikandi lættan og greiðan hátt at sagt frá og greinað rembingar og rørslur kring allan heimin í fortíð og nútíð, sum aftur hava verið grundarlag undir kvalifiseraðum metingum um útlitini fyri framtíðar gongdini.

**J**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á einhvønn hátt gjørdu 60 ára føðingardagin 11. oktober 2006 ógloymandi, takki eg hjartaliga.

Takk fyri gávur, kort, uppringingar og tøkk til tykkum, sum komu inn á gólvið.

Harrans signing, við ynskjum um gleðilig jól og gott nýggjár.

**Bergfinn Joensen við familju**

## 30 ára starvsdagur



12. desember 2006 hevði Jógvan Fagraklett 30 ára starvsdag á danska reiðaríinum Skagerak. Tríati ár eru liðin, síðan Jógvan fór fyrsta túrin við nótabátinum Strømegg, heimahoyrandi í Hirtshals. Fiskað hevur verið eftir sild, makreli og lodnu í Norðurhøvum og Norðsjónum.

Jógvan hevur verið á sjónum í 42 ár og siglt við seks ymiskum bátum so sum Trio, Grím Kamban og Erik Jalli, áðrenn hann í 1976 fór umborð á Strømegg. Á Strømegg hevur Jógvan verið stýrimaður øll tríati árini.

Jógvan er giftur Elly, og tey eru búsitandi í Kollafirði, har Jógvan eisini er uppvaksin. Saman eiga tey tríggjar synir: Virgar, Annfinn og Eiler, og átta ommu- og abbabørn.

Saman við elsta soninum Virgari, eigur Jógvan eisini bátin Sjódrang, sum teir fiska eftir hummara og royna á Norðhavinum við.

Nýggjur Strømegg verður liðugt bygdur komandi summar, og uttan iva verður Jógvan nógv ár afturat har umborð.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, ið mintust meg
á 80 ára degnum.
Tøkk fyri vitjan, uppringingar,
telegrammir, blómur og gávur.
Ein serlig tøkk til børnini við familju, sum
gjørdu mær dagin hugnaligan og tey, sum
vundu Merkið á stong.
Við ynski um eini gleðilig jól og
eydnuberandi nýggjár.

**Einar Joensen, Oyndafjørður**

**Dagurin í morgin**

**13. desember. Lucia**, deyð umleið ár 300. Ung genta úr Syracus í Sikiloy. Hon var trúlovað heidnum ungum manni, men narraði hann, varð klagað fyri kristnu trúgv sína og tikin av døgum. Siðurin við luciugongum við gentum við tendraður ljósi í hárinum er komin úr Svøríki. Navnið Lucia kemur av latínska orðinum lux, sum merkir ljós.

Sosialurin